
23. november 2009, kl. 9.00


24. desember 2009, kl. 9.00


29. januar 2010, kl. 9.00


24. februar 2010, kl. 9.00


*So trúfastur sum nakar. Eisini í morgun fer Jógvan á Dul á sama stað klokkan 9:00 at taka mynd – her í Grím Kambansgøtu í Havn*

**MYND:** JENS KRISTIAN VANG

# Hvønn morgun klokkan 9:00

GONGUR TÚ EIN MORGUNTÚR EFTIR **GRÍM KAMBANSGØTU** Í HAVN **KL. 9:00**, ER EIN ÁVÍS SJÓN PÚRA VISS: **JÓGVAN Á DUL** STENDUR VIÐ **MYNDATÓLI** SÍNUM OG TEKUR ENN EINA **MYND**.



**MYNDIR**

Snorri Brend
snorri@sosialurin.fo

– Eg havi altíð havt áhuga fyri fotografering, sigur 67 ára gamli Jógvan á Dul.

Soleiðis hevur tað verið í mong ár. Hann er at kalla vorðin ein havnamynd, har hann gongur túr við hundi sínum og við einum myndatóli í lummanum.

– Við tí digitala myndatólinum er alt so nógv lættari, sigur hann.

Longu sum smádrongur fekk Jógvan á Dul sítt fyrsta myndatól – í roynd og veru fyri 55 árum síðani.

– Og síðani tá, havi eg tikið myndir, onkutíð nógvar og til aðrar tíðir færri, sigur hann brosandi.

Sum limur í Gongufelagnum í Havn stendur hann á 1. parkett til vakrar myndir, tá tey fara gonguferðir kring landið.

Tað var eftir ein slíkan túr á Eystnesi at ein av gongufelagum hansara spurdi, hví hann ikki gav uppaftur fleiri fólkum møguleika at síggja myndir hansara umvegis alnótina.

Hetta var sjálvandi gamaní, men tað kravdi kortini at Jógvan gjørdi eina kollveltandi íløgu: Hann noyddist at keypa sær eitt digitalt myndatól og nýggja teldu.

Men hvat ger ein ikki fyri sítt ítriv? Hann so gjørdi; keypti sær teldu og eitt lítið myndatól fyri 600 krónur.

Og í januar mánaði í ár, fekk hann enn eina áheitan um tað sama, hesaferð frá Elini Heinesen um loyvi at brúka myndirnar á heimasíðuni www.heinesen.fo.

Nú ber til at síggja mongu og forvitnisligu myndir hansara á hesi heimasíðuni, umframt tað at hann eisini almannakunnger tær á sínum Facebook-profili og umvegis www.flickr.com.

– Eg fái nógvar reaksjónir frá fólki, serliga frá fólki úr Havn sum búgva úti í heimi, t.d. í USA, Mexico, Týsklandi og Norðurlondum.

– Tey halda tað vera áhugavert at kunna síggja nýggjar myndir úr Føroyum, serliga ta myndina sum eg taki á sama staði og somu tíð hvønn einasta dag, greiðir hann íðin frá.

Henda myndin verður tikin soleiðis, at ein sær hvussu veðrið er og hvussu árstíðin skiftir.

– Jú, fólki dámar væl hesar myndirnar. Eg havi hoyrt frá fólki, at tey brúka mínar myndir sum bakgrund á telduskíggjanum.

So heilt av leið kunnu myndirnar ikki vera!

## INNIHALD

4 SAMRØÐA: **HØGNI REISTRUP UM NÝGGJU FLØGUNA**
6 TIPS: **RÆTTAN LIT TIL TÍNA HÚÐ**
8 90 SEKUND: **RUDOLF JOENSEN**
10 SAMRØÐA: **HEILSUFRØÐINGURIN BJØRGHILD DJURHUUS**
12 TIL ARBEIÐIS: **WILLIAM MACKAY**
13 UMAFTURAFTURUM: **HØGNI DJURHUUS**
14 BÓKMENTUR: **KARL OVE KNAUSGÅRD**
15 REPORTASJA: **BURTURMIST Á POLITISTØÐINI**
16 GREINARØÐ: **KALDA KRÍGGI**
18 SPYRST SO LIVST: **RIGMOR SVARAR**
19 MÍN BESTA UPPSKRIFT: **SKONS**
23 TAÐ HENDUR: **KONSERTIR, BØKUR, SENDINGAR OSFR**
24 VIKUMYNDIN: **BESTA MYNDIN Í VIKUNI**

# Tá ið tygor lukta blóð ...

**KLUMMA**

Snorri Brend
snorri@sosialurin.fo

Hetta var eitt hóskvøld miðskeiðis í 80'unum. Veðurgudarnir vístu seg frá síni ringastu síðu, og herviligt ódnarveður herjaði kring landið. Eisini á flogvøllinum í Vágum var vindurin hin mesti, – í roynd og veru so nógvur, at tyrlan sum stóð parkerað har koppaði.

Hetta vóru sjálvandi stórtíðindi á redaksjónunum morgunin eftir. Vit á Dimmalætting avgjørdu at hetta skuldi á forsíðuna. Vit avgjørdu, at eg skuldi fara vestur at taka myndina, meðan eitt av hinum blaðfólkunum ordnaði tekstin.

Her ráddi um at gera skjótt av, tí blaðið hevði deadline nakað eftir døgurða. Men trupulleikin var, at ein mátti sigla um Vestmannasund við ferjuni. Ein kundi rokna við bíðitíð, bæði á Oyrargjógv og í Vestmanna.

Umborðkomin hitti eg tíðindamann frá øðrum miðli í somu ørindum, og komu vit í prát. Ikki høvdu vit sitið leingi, fyrrenn ein koyrilærari kom og setti seg við okkara borð. Hann skuldi eisini á flogvøllin, – ikki eftir ferðafólki; ikki at fregnast um tyrluna; men á eitt skeið í ferðslutrygd fyri koyrilærarar á Hotel Vágum.

Hjá mær ráddi um at gera skjótt av: Taka myndina, og so avstað aftur móti høvuðsstaðnum. Eg náddi so akkurát at síggja, at koyrilærararnir koyrdu við bilum sínum úti á sjálvum flogvøllinum, áðrenn kósin varð sett móti Oyrargjógv. Hetta fyribyrgjandi arbeiðið hevði ikki mín stóra áhuga beint tá.

Umborð á ferjuni hendi tað sama sum á útferðini. Tveir tíðindamenn og sami koyrilærarin hittust til prát. Koyrilærarin fregnaðist eftir, um vit høvdu loyst okkara uppgávu. Jú, so var.

Hann hevði verið á skeiði hjá koyrilærarum fyri at læra, hvussu ein kundi forða ferðsluvanlukkum á føroysku vegunum. Vit høvdu verið har eftir eini sensasjón, men høvdu als, als ongan áhuga í tí fyribyrgjandi arbeiðinum hjá koyrilærarunum.

Tá er tað, at hann tekur til orðanna og við rámandi suðuroyarmáli tók til: »Tá ið tygor lukta blóð, tá kom tygor!«

Tað var eitt gott petti av sannleika í hesum orðum hansara. Havi ikki gloymt tey síðani!

VIKUSKIFTI
**Redaktørar:** Inna Törnroos og Eyðun Klakstein
**Útgevari:** Sosialurin, www.sosialurin.fo
**Umbróting:** Sosialurin · **Høvuðssniðgevi:** Pætur Eyðunsson Jensen
**Forsíðumynd:** Høgni Reistrup / Rólant Waag Dam